# Jógvan Sundstein sigur so mangt

**Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur onga viðmerking til at gaman topp-politikari heldur, at hann antin má biðja um umbering, ella leggja frá sær**

FORMANSSKAPUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í grein aðrastaðni í blaðnum í dag, finst Jógvan Sundstein harðliga at framferðini hjá Edmundi Joensen, løgtingsformanni hesar seinastu dagarnar.

Jógvan Sundstein var topp-politikkari í Føroyum í eitt mannaminni og hann var bæði løgmaður, landsstýrismaður og løgtingsformaður í langa tíð.

Og hann sigur, at hann ræðist framferðina hjá løgtingsformanninum og formanninum í uttanlandsnevndini.

Eitt, sum serliga ørkymlar Jógvan Sundstein, er, at Edmund Joensen í samrøðu við Útvarpið segði, at tingfólk atkvøddu ikki eftir síni sannføring.

– Hetta er ein álvarsom skuldseting bæði móti tingmonnum og eisini móti løgmanni, sum formaðurin sigur hava trýst tingmenn at atkvøða fyri sínum uppskoti, sigur Jógvan Sundstein.

Hann sigur eisini, at tá ið tingformaðurin alment skuldsetur tingfólk fyri ikki at fylgja síni sannføring kann hann ikki sleppa við, at hetta bara verður sent út í luftina og síðani gloymt.

– Løgtingslimir eru bert bundnir av sannføring síni, stendur í stýrisskipanarlógini. Tá ið formaðurin skuldsetur sínar limir fyri at bróta hesa lóg, er nakað spinnandi galið, antin við formanninum ella við tingmonnunum.

– Í øllum førum má formaðurin prógva sína skuldseting. Um hann ikki kann hetta eru bert tveir møguleikar eftir. Annar er at biðja um umbering ella at leggja frá sær sum formaður.

Annars sigur Jògvan Sundstein, at hann er skelkaður av orðaskiftinum á Løgtingi í farnu viku.

– At hoyra menn kalla aðrar "gleðisgentur", at vilja leggja starvsfelagar inn á psykiatriskar deildir, at sita og rópa eftir røðarum niðri frá tingsalinum, tað hoyrir ikki heima í einum parlamenti.

– Í hvussu so er ikki um okkara leiðir.

– Eg var sjálvur tingmaður í 24 ár, men líknandi galimatias minnist eg ikki, sigur Jògvan Sundstein.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur onga viðmerking til Jógvan Sundstein.

– Jógvan Sundstein sigur og mangt, er einasta heilsanin frá løgtingsformannium til gamla starvsfelagan.



*Gamli topp-politikarin, Jògvan Sundstein heldur, at tað, sum fyrifórt í Løgtinginum í farnu viku, var galimatias, men Løgtingsformaðurin hevur onga viðmerking*

---

# Halda at formaðurin er partískur

**– Vit halda, at løgtingsformaðurin gevur summum tingfólkum longri tjóður á tingsins røðarapalli enn øðrum, sigur Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á tingi**

FORMANSSKAPUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Løgtingsformaðurin er partískur.

Tað heldur formaðurin í javnaðarflokkinum í tingi.

Kristian Magnussen sigur, at javnaðarflokkurin er so ónøgdur við arbeiðsháttin hjá løgtingsformanninum, at hann nú fer at gera vart við tað.

Sostatt fer javnaðarflokkurin nú at senda formansskapinum í Løgtinginum eina skrivliga viðmerking um støðuna og har hann fer at gera vart við sína misnøgd.

Tað, sum Javnaðarflokkurin er misnøgdur við, eru tær sømdir, sum tinglimir fáa, tá ið teir eru á tingsins røðarapalli.

– Løgtingsformaðurin er formaður fyri alt tingið og tí eigur hann eisini at viðgera allar tinglimir eins, sigur Kristian Magnussen.

Men tað er júst tað, sum hann heldur, at Løgtingsformaðurin ikki ger.

– Vit halda, at summi tingfólk fáa longri tjóður, tá ið tey standa á tingsins røðarapalli, enn onnur tingfólk fáa, sigur hann

Hann heldur sostatt, at tað er ymiskt, hvussu nógv summi tingfólk kunnu loyva sær at siga og, hvønn málburð, tey kunnu brúka.

– Summi kunnu loyva sær at kalla hvat sum helst, uttan at verða átalað, men onnur fáa neyvan latið munnin upp, so talar løgtingsformaðurin at.

– Tí er tað mítt páhald, at løgtingsformaðurin ikki setir øll tingfólk javnt.

Kristian Magnussen vil tó ikki seta nøvn á tey tingfólk, sum hann heldur, fáa betri sømdir frá formansskapinum enn onnur.

### Fór út um umark

Akkurát hvat fer at standa í brævinum til formansskapin, fær hann ikki sagt nakað um enn, tí fyrst skal tingmanningin tosa saman um málið.

Hann heldur ikki, at brævið verður skrivað sum ein beinleiðis klaga, men tað verður í øllum førum skrivað sum ein viðmerking frá javnaðarflokkinum til arbeiðsháttin hjá formansskapinum.

Hóast Kristian Magnussen ikki vil seta nøvn á tey tingfólk, sum hann heldur, fáa longri tjóður frá tingformanninum, enn onnur, er tað greitt, at eitt, sum hann hevur í huganum, er orðaskiftið á løgtingið tann eina dagin í farnu viku, har John Johannessen, tingmaður javnaðarfloksins varð kallaður gleðisgenta, sum er ein hora og har tað varð spurt, um Løgtingið ikki kundi útvegað honum ein innleggingarseðil til psykiatrisku deild.

Undir hesum orðaskiftinum var rættiliga ófriðarligt í tingsalinum og tá ið John Johannessen hevði orðið, vóru harðligar viðmerkingar at hoyra frá tingfólki í salinum.

Tað er heilt óvanligt í orðaskifti á Føroya Løgtingi, men kortini talaði løgtingsformaðurin ikki at.

Og Kristian Magnussen heldur, at hesa ferðina megnaði Løgtingsformaðurin ikki at forða fyri, at orðadrátturin fór út um mark.

– Tað er hansara uppgáva at syrgja fyri, at orðaskiftið ikki fer út um mark, men tað megnaði hann ikki í hesum føri.

Men hann leggur dent á, at tað var ikki bara henda dagin, at Kristian Magnussen heldur, at summir tinglimir hava fingið betri sømdir frá løgtingsformanninum enn onnur, tí tað eru onnur dømi eisini.



*Summi tingfólk fáa longri tjóður enn onnur og tí er løgtingsformaðurin ikki ópartískur, heldur Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á Løgtingi. Flokkurin fer nú formliga at gera vart við sína ónøgd*

### Fær vanliga viðgerð

Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur als ongar viðmerkingarnar til páhaldið frá javnaðarflokkinum um, at allir tinglimir verða ikki viðgjørd eins.

Tað einasta, hann sigur, er, at fær formansskapurin eitt bræv frá javnaðarflokkinum, fer tað at fáa tað viðgerð í formansskapinum, sum tað eigur at fáa og so fær javnaðarflokkurin eitt svar.